# Nýggjar umhvørvisvinarligar fløskur frá PM




**Heilsølan hjá Poul Michelsen hevur verið í støðugari menning, síðani byrjanina í 1974, og umboðar fleiri vørur. Fyritøkan selur m.a. sodavatn frá Royal Unibrew, og eru nýggju og umhvørvisvinarligu fløskurnar ein sólskinssøga**

P/F Poul Michelsen hevur sína søgu aftur til 1974. Poul Michelsen byrjar sítt virksemi í kjallaranum heima í Gundadali. Tey fyrstu árini virkaði fyritøkan sum firma, men í 1977 varð fyritøkan umskipað til partafelag. Í 1979 bygdi felagið við Hoyvíksvegin. P/F Poul Michelsen, ella PM, sum fyritøkan vanliga verður nevnd, hevur síðan tá verið í støðugari menning.

Byrjað varð sum serheilsøla innan sølu av køli- og frystivøru, men í dag er úrvalið nakað væl størri, og tænasturnar nógv fleiri.

Umframt køli- og frystivøru, eru vit eisini serkøn innan frukt og grønmeti, catering, provianteringar og bakaravøru.

PM er eisini umboð fyri m.a. Faxe leskidrikkir, Merrild kaffi og Credin bakaravørur. Hesum tænastum eru tað serdeildir innan PM, sum taka sær av.

Seinasta nýggja er, at PM nú eisini bjóðar seg fram sum heildarveitara, og kann bjóða vørubólkar innan matvøruhandil og mattænastu.

Sodavatn í umhvørvisvinarligum fløskum

Øll kenna Faxe sodavatn, og aðrar danskar sodavatnsfløskur. Hesar umboðar PM eisini.

Aftanfyri Faxe-kondi stendur Royal Unibrew, sum umboðar donsku bryggjaríini Faxe, Ceres, Thor, Albani og Maribo.

Men Royal Unibrew er meira enn Faxe-kondi. Pepsi Cola kemur eisini frá Royal Unibrew og sodavatnsmerkið Mirinda sæst eisini kring alt landið.

Royal Unibrew er komin við nýggjari og umhvørvisvinarligari fløsku, ið hevur fingið sera góða móttøku. Og alt bendir á, at so verður eisini í Føroyum.

Nýggju fløskurnar eru vakrari og lættari. Eisini slepst undan kassum hjá handlum og hjá útkoyrarum, og hetta lættir um og minkar hettar um nýtslu av brennievni, og harvið útláatinum av $CO_2$.

Ístaðin fyri kassar, er plast um fløskurnar, og við brenning verður hetta upployst í vatni og koldioxid. Eisini er nýggja fløskan tunn, so hon kølist skjótari í kuldaskápinum.

Pant fæst fyri fløskurnar, ið eisini verða endurnýttar fult út.

Hjá PM starvast umleið 50 fólk.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Dekkserviettar
Reyður, svartur, silvur ella gull
Rundir Ø38 cm
fyri hvønn bert
34,95



Staravegur 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 55 88 · www.skemman.fo
SKEMMAN

Handilsstaðið í Suðuroy
Snið til tín gerðandisdag



Torgið Sp/f, Vágsv. 62, Vágur 612096

Jólaskógvarnir til barnið
Bundgaard
barnaskógvar
kr. 699,-



Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 · TLF. 311705
EURO SKO EURO SKO



Minst til 1. desember...



Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum
áðrenn 1. desember
TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari
sansir.fo